# Nú er tannlækni aftur á Tvøroyri

**Annika Næs Johannesen letur nú upp nýggja tannlæknastovu á Tvøroyri**

TANNARØKT
*Áki Bertholdsen*



*Annika Næs Johannesen fer nú at verða tannlækni á Tvøroyri og tað hevur stórur tørvur verið á í mong ár. Hon fer nú at lata tannlæknastovuna hjá Diaba uppaftur, men við spildurnýggjum amboðum og nýggjari útgerð, eins og øll hølini eru nýggj innan og innrættað av nýggjum*

Í Norðaru helvt í Suðuroy hava tey verið illa fyri við tannlækna seinastu árini, tí umframt skúlabarnatannlæknarnar í Vági og á Tvøroyri, hevur bara verið ein tannlækni til vaksin fólk og hann hevur verið í Vági.

Men nú verður aftur tannlækni á Tvøroyri.

Tað er Annika Næs Johannesen, sum nú letur tannlæknastovu upp í hølunum, har gamla tannlæknastovan hjá Diaba var mitt á Tvøroyri.

Men hóast hølini eru gomul, eru tey øll gjørd spildurnýggj innan eins og øll útgerðin og øll amboðini eru spildurnýggj.

Hon hevur almenna móttøku í nýggju, ljósu tannlæknastovuni í dag frá kl. 13 til 17. Men áðrenn hon fer til arbeiðis av álvara, skal hon fyrst á eitt stutt skeið uttanlands, so hon fer ikki at viðgerða fólk fyrrenn í aðru viku.

Men kortini ber tað longu nú mánadagin til at biðja um tíð til viðgerð.

Annika Næs Johannesen tók prógv sum tannlækni í 1997 og síðani hevur hon arbeitt í Aasiaat í Grønlandi í trý ár.

– Tað var ógvuliga strævið, tí tanntrupulleikarnir vóru stórur og tað var nógv at gera. Vit vóru bara tveir tannlæknar til 3.500 fólk og av tí, at nógv høvdu vánaligar tenn, var eisini nógv, sum kravdi bráðneyðuga viðgerð, og tí var eisini nógv arbeiði um vikuskifti. Men annars vórðu hølini og útgerðin í Grønlandi fyrsta floks, leggur hon afturat.

Í Grønlandi skiftust tey um, so at tey arbeiddu við børnum aðruhvørja viku og við vaksnum fólki aðruhvørja viku.

Harumframt vóru tvær oyggjar við í kommununi og tey høvdu krav uppá tannlækna einaferð um árið. So einaferð um árið, pakkaðu eina flytiliga tannlæknastovu og fóru við báti út á oyggjarnar, har vit so vóru í einar fýra dagar hvørja ferð. Vit tóku so fólk í viðgerð eftir aldri, børnini fyrst, síðani tey ungu og at enda tey vaksnu.

Annika væntar avgjørt, at tað fer at vísa seg, at føroyingar hava betri tenn enn grønlendingar hevðu. Men her verður arbeiðsbyrðan heldur ikki so stór, tí í Suðuroy vera tey nú eisini fýra tannlæknar til tey gott 5.000 fólkini, sum búgva í oynni.

Ímeðan hon var í Grønlandi, heittu kommunur í norðaru helvt í Suðuroy á hana um at koma heim. Kommunurnar hava goldið fyri at innrætta húsini, men sjálv eigur hon alla útgerðina.

– Hevði eg ikki fingið hesar sømdir frá kommununum, hevði eg ikki komið heimaftur, sigur hon.

Og at saknur hevur verið í tannlækna á Tvøroyri, hevur hon týðiliga merkt, tí hon sigur, at allastaðni har hon kemur, fegnast fólk um at hon skal byrja á Tvøroyri.

Saman við tveimum hjálparfólkum fer hon sostatt nú undir tannlæknavirksemi á Tvøroyri undir navninum »Tannarøkt«.

# Føroyingar hjálpa til at basa oljudálking í Spania

**Í gjárkvøldið fór útgerð av Tvøroyri av landinum til Spania, har hon skal verða liður í royndunum at basa herviligu dálkingini úr tangaskipinum Prestige**

ALTJÓÐA SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*



*Nú er útgerð eisini farin úr Føroyum niður til Spania í eini roynd at basa herviligu oljudálkingini har. Pauli Einarsson, sum letur útgerðina, sigur, at fyritøka hansara á Tvøroyri hevur eisini menn tilbúnar at fara til Spania, verður boð eftir teimum og tað kann verða so skjótt, tí støðan er ógvuliga hættislig*

Nú eru eisini boð eftir føroyingum at hjálpa til við arbeiðnum at basa herviligu oljudálkingini í útnyrðingshorninum á Spania.

Tað hevur ført til eina umhvørvisvanlukku í ólukkumát at tangaskipið Prestige sakk burtur har á leiðini og stór strandastrekki í Spania eru illa dálkað av tjúkkari olju og nú skilst at eisini portugisar eru farnir at stúra fyri, at olja skal reka á land har.

Síðani er manning og útgerð savna saman úr øllum heiminum í eini roynd at basa dálkingini og í at avmarka skaðan mest møguligt.

Og nú eru eisini føroyingar eru komnir upp í hetta arbeiðið.

Tað er fyritøkan OSR (Oil Spill Response), hjá Paula Einarsson á Tvøroyri, sum hevur fingið áheitan um at hjálpa til við útgerð.

Og í gjárkvøldið fór útgerð av Tvøroyri við farmaskipinum, Clare, til Danmarkar, haðani útgerðin verður førd víðari suður til Spania.

– Talan er um 200 metrar av flótiverju, sum OSR hevur og sum nú verður send til Spania, sigur Pauli Einarsson.

Hetta er flótiverja, sum verður blást upp og sum verður løgd í vatnskorpuni at forða fyri, at olja á sjónum breiðir seg.

Fyritøkan hjá Paula Einarsson samstarvar við MMB (Maritim Miljø Beredskab) í Noregi og tað er í samstarvi við teir, at OSR letur útgerðina.

– Hetta er so umfatandi dálking, at tað er neyðugt at savna inn útgerð allastaðni frá í heiminum í eini roynd at basa henni.

Pauli Einarsson sigur, at útgerðin, teir hava latið, er ætlað til at brúka úti á opnum havi og hetta er útgerð, sum oljufeløgini hava leigað og sum av røttum eigur at verða til taks hjá boripallunum til Havs.

– Men oljufeløgini hava verið so beinasom, at tey hava játtað, at útgerðin verður flutt til Spaina í hesum serliga førinum, bara vit kunnu vátta, at hon er til taks aftur í Føroyum næsta vár – og tað verður hon.

### Eisini fólk til reiðar

At komið verður heilt til Føroyar eftir útgerð, sigur eitt sindur um, hvussu umfatandi oljudálkingin er.

– Men tað sigur eisini eitt sindur um, hvussu víttfevnandi og heimsumfatandi samstarvið er á hesum økinum og tað er ein stór trygd í tí, heldur Pauli Einarsson, tí tað sigla eisini stór tangaskip framvið Føroyum.

Hann sigur, at enn er onki fólk frá OSR farið til Spania.

– Teir vilja royna sjálvir sum longst við teirra egna fólki. Men teir hava eisini boðað frá, at tað kann koma uppá tal at fáa fólk niður og tí stendur manning hjá OSR eisini tilbúgvin at fara til Spania, verður boð eftir teimum.

Samstundis kann tað eisini koma upp á tal at senda meiri útgerð til Spania.

Hetta eru alt fólk, sum hava verið á skeiði í at basa oljudálking og sum duga at brúka slíka útgerð.

Tað er kanska ljótt at siga tað, nú dálkingin í Spania er so umfatandi, men Pauli Einarsson hevði onki havt ímóti at verðið boðsendur at komið til Spania.

– Okkara fólk hevur verið á fleiri skeiðum. Men at royna tað í verkið er nakað heilt annað og tað hevði givið okkum ómetaliga góðar royndir at verið við í einum so umfatandi arbeiði, har vit sluppu at royna tað í verki í eini umfatandi umhvørvisvanlukku, sum vit annars bara hava lært á skeiðum.

### Nakað at hugsað um

Annars heldur hann, at ein vanlukka sum tann í Spania, eigur at verða hugvekjandi hjá føroyingum, tí tað sigla eisini stór Tangaskip framvið Føroyum.

– Tey sigla aloftast sunnanfyri okkum, men viðhvørt er ættin so, at teir vera norðanfyri okkum. Og hóast teir eru langt úr landi, vísir dømi úr Spania, at vit skulu aldrin siga aldrin og vit eiga avgjørt at vera á varðhaldi, heldur Pauli Einarsson.

Út við 20.000 tons av olju runnu úr tangaskipinum Prestige, tá ið tað fór at leka í illveðri útfyri útnyrðingsspania 13. november. Seks dagar seinni, 19. november, brotnaði tað av um tvøran og sakk á yvir 2. kilometra dýpi. Oljan hevur dálkað stór strekki av strond í Spania og higartil eru nøkur túsund tons av olju tikin upp at strondini. Tilsamans eru yvir 180 strendur í Spania dálkaðar og umframt dálking, hevur tað fingið umfatandi avleiðingar fyri útróður av ymsum slagi og djóralívið har á leiðini.

Men nú hevur ein franskur kavbátur harafturat avdúkað, at olja enn lekur úr skipunum.

Myndir, sum kavbáturin hevur tikið, vísir, at tjukk olja lekur úr skipinum upp ígjøgnum sjógvin sum tannkrem ið verður kroyst úr eini tubu, og nú rópa eisini Portugisar varskó tí teir stúra fyri dálking, umframt at oljudálkaðir fuglar eisini eru funnir í Fraklandi, har teir eisini stúra fyri, at olja skal reka á land, tí tað gongur tann vegin.



# Brandbilurin er keyptur

**Miðvágs- og Sandavágs kommunur hava keypt brandbil saman við partafelagnum Vágatunlinum. Bilurin verður væntandi í Føroyum í mars næsta ár**

TRYGD
*Edvard Joensen*



*Brandbilurin hjá Kvívíkar Kommunu. Bilurin, sum Miðvágs- Sandavágs kommunur og Vágatunnilin nú hava keypt, líkist hesum. Tó er bygnaðurin aftan eitt sindur øðrvísi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sandavági:** Nógv umrøddi brandbilurin, sum Miðvágs- Sandavágs Sløkkilið skuldi fáa til vega, er nú keyptur. Kommunurnar báðar hava í felag við partafelagnum Vágatunlinum keypt bilin.

Talan er um ein bil av sama slagi sum tann, Kvívíkar Kommuna fekk herfyri, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági. Tó er hesin eitt sindur øðrvísi bygdur aftan, hóast karrossaríið er tað sama sum á kvívíksbilinum. Umframt hevur hesin bilurin, sum nú er keyptur, nakað væl av eykaútgerð eisini.

Kortini er hann bíligari, enn tað, lagt varð út við, tá tosað varð um at keypa bil úr Íslandi.

Fyrsta uppleggið var upp á hálvaaðru millión krónur fyri sjálvan bilin, sigur Rósa Samuelsen. Í dag kostar hesin bilurin, sum er keyptur úr Danmark, 1,2 milliónr krónur.

Prísurin fyri sjálvan bilin er 1,1 millióni, sigur hon, meðan eykaútgerðin, sum er við, kostar umleið 100.000,- krónur. Talan er millum annað um samskiftisútgerð, sigur borgarstjórin í Sandavági.

Kostnaðurin er soleiðis býttur, sigur Rósa Samuelsen, at Miðvágs- og Sandavágs kommunur gjalda tilsamans 550.000,- krónur, meðan partfelagið vágatunnilin rindar tær 650.000,- kónurnr, sum eftir eru.

Bilurin, sum nú er keyptur, er danskur, meðan tann hjá kvívíkingum er íslendskur. Báðir eru av merkinum Ford.

Rósa Samuelsen sigur, at byggitíðin er tríggjar mánaðar, og verður bilurin væntandi í Føroyum einaferð í mars næsta ár. Til ta tíð er ein bilur leigaður úr Klaksvík.

# Hini jólatrøini tendrað



**Seinasta leygardag varð jólatræið á Vaglinum í Havn tendrað. Í dag verða hini trøðini í útjaðara høvuðsstaðsins tendrað**

JÓLATRØ
*Tíðindaskriv*

Jólatrøini á Argjum, Hvítanesi, í Kaldbak, Norðradali og í Kollafirði verða tendrað leygardagin 7. desember soleiðis:

kl. 15.30 verður jólatræið á Argjum tendrað. GHM spælir, Heri Joensen, prestur, og Bjarti Mohr, býráðslimur, tala.

kl. 16.30 verður jólatræið í Kaldbak tendrað. GHM spælir, Sonja Klein, prestur, og Tórfinn Smith, býráðslimur, tala.

kl. 17.00 verður jólatræið á Hvítanesi tendrað. Havnar Hornorkestur spælir, Sverri Steinhólm, prestur, og Páll Petersen, tala.

kl. 16.00 verður jólatræið í Kollafirði tendrað. Terji Davidsen talar.

kl. 18.30 verður jólatræið í Norðradali tendrað. GHM spælir, Sverri Steinhólm, prestur, og Tórfinn Smith, býráðslimur, tala.

